# Mugu útseta rokningar fyri at halda føðingardag

**Eingin peningur til sjónvarp- og útvarpsgjald. Eingir biograf-, cafe- ella býtúrar. Yvirdrátt á kontu hvønn mánað. Útsettar rokningar fyri at hava pening til føðingardagar. Tríggir samfelagslesandi føroyingar á lærda háskúlanum í Roskilde hava kannað støðuna hjá einligum mammum í Havn, og talan er um alt annað enn eina sólskinssøgu**

EINLIGAR MAMMUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



**EINLIGAR MAMMUR VIÐSKERDAN LUT:** *Vælferðarstaturin hevur í fleiri áratíggju verið stoltleikin hjá Norðanlondum, men á fleiri økjum eru føroyingar eftirbátar. Kanningin hjá teimum trimum samfelagslesandi vísir greitt, at inntøkugrundarlagið hjá føroysku kvinnunum er væl lægri enn eitt nú í Danmark. Fremstu orsøkirnar til lága inntøkugrundarlagið hjá einligu mammunum í Havn er ov høgir húsaprísir og ov lágar sosialar veitingar.*

*Modellmynd: Jens Kristian Vang*

"At leggja tey menninskansligu virðini í politikkin, so at politikkurin alla tíðina hevur sum mál at skapa eitt betri og eitt tryggari samfelag-lata politikkin stutt og greitt snúgva seg um menniskjuni".

Løgmaður Jóannes Eidesgaard boðaði í fyrstu løgmansrøðu síni á ólavsøku um, at bjartasta málið ein samgonga kann seta sær er at skapa eitt gott samfelag fyri øll.

Í vár hava tríggir samfelagslesandi føroyingar á lærda háskúlanum í Roskilde kanna støðuna hjá einligum mammum í Havn í teirra BA-uppgávu, og talan er um alt annað enn eina sólskinssøgu hjá føroyska vælferðarstatinum.

Einligu mammurnar í høvuðsstaðnum hava ómetaliga torført við at fáa endarnar at røkka saman, og samanborið við støðuna hjá einligum mammum í okkara grannalondum, eru føroysku mammurnar illa fyri.

Teir tríggir samfelagslesandi Rókur Jakobsen, Jóhann Lützen og Fróði Jacobsen rópa tí varskó til politiska myndugleikan um at taka hendan illa sperda bólk í føroyska samfelagnum í størri álvara.

## Fáar hentleikar

Kanningin av einligum mammum er bygd um samrøður við sjey ymiskar kvinnur, sum búgva í høvuðstaðnum.

Felags fyri hesar kvinnurnar er, at inntøkugrundarlagið hjá teimum er ómetaliga lágt og røkkur ikki til vanligar hentleikar, ið eyðkenna gerandisdagin hjá flestum okkara. Millum hesar hentleikar kunnu nevnast biograf-, cafe- og býtúrar, ið hesar kvinnur sjáldan kunnu ditta sær at royna.

Flestu klæðini verða keypt á útsølu, og peningur er heldur ikki tøkur til at rinda sjónvarps- og útvarpgjaldið. Fleiri hava eisini kent seg noyddar at útseta rokningar fyri hava pening til føðingardagar og konfirmasjónir. Tað kemur eisini javnan fyri, at einligu mammurnar kenna seg noyddar at yvirdraga kontuna fyri at fáa røkkarnar at hanga saman.

Felags fyri mammurnar er, at tær altíð seta tørvin hjá børnunum frammum sín egna. Hóast einligu mammurnar hava lítið fíggjarliga at geva av, verður nógv lagt fyri, at børnini hava tað gott.

Hvønn leygardag ganga tvey fólk runt í handlum í Havn fyri at savna saman frukt og grønmeti, ið er um at fara um seinasta søludag. Handlarnar lata fruktina og grønmeti ókeypis, og gávan verður latin illa sperdum húsarhaldum. Fleiri av einligu mammunum gera sær dælt av tænastuni, tí peningur røkkir ikki til frukt og grønmeti í gerandisdegnum.

## Solidariteturin avgerandi

Hóast allar kvinnurnar eru illa sperdar fíggjarliga, megna flestu teirra kortini at hóra undan. Tað er kortini ikki við hjálp frá tí almenna, men hinvegin hollur stuðul frá familjuni, sum ger, at einligu mammurnar klára seg sømuliga. Familjurnar hjálpa við mati, barnaansing, peningi og bústaði.

– Vit erpa okkum av at hava ein vælútbygdan vælferðarstat, har tað almenna veitir fólkum, ið ikki klára seg, ein hjálp. Kortini fáa einligu mammurnar alt ov lítið til at klára seg nøkunlunda. Teirra inntøkugrundarlag er langt undir miðal hjá vanligum einstaklingum og familjum, og tær hava tí ongan møguleika at liva á sama støði, sum vit onnur. Tað er ikki føroyski vælferðarstaturin, ið kann breggja sær av at nakrar av hesum kvinnum kortini klára seg nøkunlunda. Høvdu tær ikki havt eitt vælfungerandi sosialt netverk, hevði støðan verið heilt hættislig, siga teir tríggir samfelagslesandi á lærda háskúlanum í Roskilde.

Teir vísa á, at siðvenjan í Føroyum við veita teimum nærmastu hjálp, tá illa á stendur, kemur veruliga til sjóndar, tá vit tosa um einligar mammur.

– Søguliga hevur vælferðin í Føroyum verið tryggja við at tey nærmastu hjálpa hvørjum øðrum. Vit kenna jú søgurnar um einkjurnar í bygdasamfelagnum, sum fólk vóru fús at hjálpa við mati og øðrum. Sami solidaritetur kann sigast at vera galdandi hjá einligu mammunum í dag, vísa Rókur, Jóhann og Fróði á.

## Orðið ein sosialpolitikk

Vælferðarstaturin hevur í fleiri áratíggju verið stoltleikin hjá Norðanlondum, men á fleiri økjum eru føroyingar eftirbátar. Kanningin hjá teimum trimum vísir greitt, at inntøkugrundarlagið hjá føroysku kvinnunum er væl lægri enn eitt nú í Danmark. Fremstu orsøkirnar til lága inntøkugrundarlagið hjá einligu mammunum í Havn er ov høgir húsaprísir og ov lágar sosialar veitingar.

– Danski staturin tryggjar einligu mammunum eina rímuliga vælferð, meðan føroysku mammurnar í stóran mun eru noyddar at dúva uppá familju og vinir. Hetta er ein beinleiðis andsøgn við, at vit eru partur av danska ríkinum og fáa eina heildarveiting til at menna ein vælferðarstat, sum kann tryggja øllum rímulig livikor.

Teir tríggir samfelagslesandi á lærda háskúlanum í Roskilde eru á einum máli um, at føroyingum vanta ein veruliga sosialpolitikk.

– Tað er ein sannroynd, at tingið er mannað við 29 monnum 3 kvinnum og hetta sæst eisini aftur. Áhugamálini hjá monnum snúgva seg um asvalt, havnir og fiskivinnu, meðan sosialpolitikkurin ikki vekir stórvegis áhuga, og tað er harmiligt. Politikararnir hava ongantíð veruliga meldað út, hvussu føroyska samfelagið skal mennast á sosiala økinum. Spurningur kann avgjørt setast við um tað er nøktandi, at tað er sosiala netverkið hjá einstaklinginum, ið ger av um fólk klára seg ella ikki. Tað má verða vælferðarstaturin, sum tryggjar fólki rímulig livikor, sláa Rókur, Jóhann og Fróði fast.

Teir nevna skipanina við bústaðartrygging(boligsikring, blðm), sum kundi verið eitt frálíkt ískoyti hjá einligu mammunum, tí júst høgi bústaðarprísurin er ein stór forðam hjá mammunum.

Bústaðartryggingin er ein solidarisk skipan, sum tryggjar teimum veikastu í samfelagnum betri kor. Ískoytið verður regulerað eftir, hvussu høg húsaleigan er í mun til inntøkustøðið.



# Hjálp tær sjálvum

**Nú summarfrítíðin er farin afturum, verður arbeiðið við sjálvhjálparbólkum fyri børn og ung, ið hava mist foreldur og systkin, tikið uppaftur**

SJÁLVHJÁLPARBÓLKUR
*Tíðindaskriv*

Í mun til seinastu skeiðini, er tilboðið nú eisini galdandi fyri børn, ið hava mist systkin við deyða. Ikki er greitt enn, um hesi børnini verða í einum bólki fyri seg ella tey verða saman við teimum, ið hava mist foreldur við deyða. Hetta verður avgjørt, tá greitt er, hvussu nógv melda til. Tó síggja bólkaleiðararnir tað ikki sum nakran trupulleika, um børnini vera í sama bólki.Í sorgarbeiðinum eru kenslur og tankar, sum hesi børn og ungu kenna aftur hvør hjá øðrum. Og tað, ið hevur stórsta týdning er, at børnini eru saman við øðrum, sum hava merkt stóra sorg á egnum kroppi, og tí hava eina aðra føling við hvørjar kenslur og tankar bylgjast í einum. Tað er júst hetta børnini og tey ungu sakna í gerðandisdegnum, bæði í skúlanum og eisini ofta ímillum vinir.

Fundirnir eru skipaðir soleiðis at pláss bæði er fyri at práta, tekna, mála, spæla og ikki minst fyri einum góðum drekkamunni. Tað er sera umráðandi, at tað er hugnaligt og trygt at koma til fundirnar, so tað verður stórur dentur lagdur á.

Eftir at hava havt tvey skeið við uml. 40 børnum og ungum íalt, meta bólkaleiðararnir, at hetta tilboðið eigur at verða verandi. Tær afturmeldingar, ið eru komnar, og tær eru ikki so fáar, hava verið positivar og børnini og tey ungu hava sum heild verið ógvuliga trúgv at møta til fundir, og hava sagt seg at vera glað fyri at koma.

Tey, ið hava hug at verða við, kunnu venda sær til Annu S. Dalsgaard á tlf. 319552/519552, el. e-mail: Janna@kallnet.fo.

# Føroyingar savnast um Føroyar

Í summar hevur verið skipað fyri føroyakvøldum ymsastaðni í Eysturoynni. Undirtøkan hevur verið góð í ár og kvøldini hava verið væl eydnaði og gestirnir sera væl nøgdir. Føroyakvøldini hava verið hildin í Skótadeplinum á Selatrað, í Kappróðrarneystinum á Glyvrum og í Bygdasalinum á Skála.

Komandi fríggjakvøld kl. 19 verður aftur føroyakvøld í Bygdasalinum á Skála. Hetta er seinasta føroyakvøldið í Eysturoynni í ár. Á skránni verður eitt breitt úrval av føroyskum mati, so gestirnir fáa etið seg mettar og roynt ymiskan siðbundnan føroyskan mat. Ymiskt undirhald verður á skránni sum t.d. upplesnaður um føroyska samfelagið, søgu og mentan, felagssangur og filmur um Føroyar. Kvøldið endar við eini dansiframførslu, har gestirnir eisini sleppa at royna stev.



*Fríggjakvøldið verður seinasta føroyingakvøldið í Eysturoynni á hesum sinni*

Atgongumerki til tiltakið kunnu keypast á Kunningarstovunum í Eysturoynni.

# Samband millum trúgv og heilsu

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 25. september kl. 13 - 16.30 skipar Synergi fyri forkunnugum seminari á Hotel Føroyum!

Kendi danski granskarin og rithøvundurin Dr. Niels Christian Hvidt, Phd. kemur til Føroya at leiða seminarið og leggja úrslit fram frá gransking síni um sambandið millum trúgv og heilsu. Medisinalfyritøkan Lundbeck hevur fíggjað granskingina.

Hvussu nógv hevur heilsa við trúgv at gera ? Síggja læknavísindin og teologiin ikki verðina við heilt hvør sínum eygum? Kunnu hesar vísindir yvirhøvur sameinast?

Seinastu árini er tendensurin, at klassiska læknavísindin hevur vaksandi áhuga í sambandinum millum tað at trúgva og heilsuna hjá fólki. Hetta hevur m.a. ført áhugaverdar royndir við sær - einttá eisini royndir við møguligu ávirkan forbøn hevur á grøðingina. Tað mest áhugaverda eru kanska ikki úrslitini, men tað, at slíkar kanningar yvirhøvur eru í gongd. Mong vilja vera við, at fyri bert nøkrum fáum árum síðandi, vóru slíkar kanningar als ikki tiknar í álvara.

Søgan sigur okkum frá eini ørgrynnu av frásøgnum um undurverk, sum skulu vera farin fram. Undurverk hava aldrin mangla í kristindómsin søgu, og gera tað heldur ikki í dag. Úr øllum heimi hoyra vit um grátandi Mariu standmyndir, um børn sum fáa opinberingar og um mirakuløsa grøðing av sjúklingum, sum læknar hava uppgivið. Tað sigst verða øking av tílíkum mirakuløsum hendingum í kristnum samanhangi í dag.

Seinni fyrilesturin tekur útgangsstøði í, hvussu man yvirhøvur definerar eitt mirakel. Alt eftir hvussu nógv verður eftir av tíðini, verður eisini farið inn á 2-3 case-stories m.a. við dømum úr nútíðini.

Bæði fyrri partur og seinni partur leggja upp til spennandi kjak m.a. í sambandi við granskingarúrslitini, ið eru komin fram. Dr. Niels Christian Hvidt, Phd. var hugskotshavari til áhugaverdu sendingarnar "Guð doktari", ið vórðu vístar í SVF fyri stuttum.

Fleiri upplýsingar og tilmelding innan 1/9 á heimasíðuni hjá Synergi, www.synergi.fo ella á tlf. 227464/225462.

# Økja um javnstøðuna

Í gjár byrjaði eitt kvinnupolitiskt seminar í Føroyum, sum verður hildið fyri kvinnuligum parlamentarikarum og øðrum í útnorði á Hotel Føroyum.

Endamálið er økt politisk javnstøða, og at økja um kvinnuliga partin av politisku avgerðartilgongdini.

Seminarið heldur áfram í dag. Kvinnupolitiska seminarið verður hildið sambært tilráðing frá Útnorðurráðnum. Seminarið endar í dag klokkan 17:00, tá Heidi Petersen flytir fram røðu.

**Listi yvir luttakarar:**

**Inatsisartut**
Agathe Fontain, Inuit Ataqatigiit
Doris Jacobsen, Siumut
Astrid Fleischer Rex, Demokraterne
Marie Fleischer, Demokraterne
Jensine Berthelsen, Atassut
Ellen Christoffersen, Atassut
Naja Joelsen, skrivari

**Alþingið**
Guðrún Ögmundsdóttir, Samfylkingin
Anna Kristín Gunnardsdóttir, Samfylkingin
Kolbrún Halldórsdóttir, Vi. hreyfingin - grænt framboð
Arnbjörg Sveinsdóttir, Sjálfstæðisflokkur
Drífu Hjartardóttir, Sjálfstæðisflokkur
Sólveig Pétursdóttir, Sjálfstæðisflokkur
Jónínu Bjartmarz, Framsóknarflokkur
Arna Gerður Bang, skrivari

**Løgtingið**
Lisbeth L. Petersen, Sambandsflokkurin
Marjun Olsen, Sambandsflokkurin
Annita á Fríðriksmørk, Tjóðveldisflokkurin
Heidi Petersen, Tjóðveldisflokkurin
Rúna Sivertsen, Fólkaflokkurin
Charlotta á Váli Olsen, Miðflokkurin
Annleyg Lamhauge, Sjálvstýrisflokkurin
Elin Lindenskov, Javnaðarflokkurin
Súsanna Danielsen, skrivstovustjóri í Løgtinginum
Marius Rein, Høgni Joensen, Birita Samuelsen, skr.

**Onnur**
Annika W. Joensen, forkvinna fyri Javnstøðunevndina

**Orðstýrari**
Bjørt Samuelsen

# Skeið um lívið

**Tíðindaskriv:** Teleios er navnið á eini skeiðrøð, sum byggir á eina samanrenning av nútímans kommunikatiónspsykologi og tí kristnu lívshugsjónina.

Skipað verður fyri tveimum vikuskiftisskeiðum í sept. mánaði.

Á tí fyrsta skeiðinum 17.-19. sept. 2004 verður undirvíst í samskifti (kommunikatión millum menniskju) Skeiðið miðar ímóti at geva luttakarunum betri fatan av teimum viðurskiftum sum ávirka teirra samskifti við onnur. Eitt nú ynskir, tørvir, fordómar, lívsroyndir.

Endamálið við hesum skeiði er:
• at læra hvussu ein lurtar eftir og hjálpir øðrum, uttan sjálvur at gerast útbrendur
• at uppliva sunnar relatiónir til familju, vinir, starvsfelagar og meinigheitir.

Á tí seinna skeiðnum 24.-26.9.2004 »Sig sandheden i kærlighed« verður dentur lagdur á at vera trúgvur móti egnum kenslum
• at tora at taka upp ósemjur
• at læra seg at siga sannleikan í kærleika

Um nóg stórur áhugi er, er ætlanin eisini at skipa fyri einum stuttum kvøldskeiði í leiðslu av smábólkum.

Hetta skeiðið er ætlað fólki, sum standa fyri smáum bólkum eitt nú cellubólkum, alfa, ungdómsbólkum, krisubólkum m.m.

Teleiosskeiðrøðin hevur vunnið stóra virðing í nógvum trúarfelagsskapum í Skandinavia.

Royndirnar hava verið so góðar, at eisini í vinnulívinum í Noregi eru Teleios-skeiðini vorðin ein eftirspurd vøra.

Kostnaður fyri hvørt vikuskiftisskeið er 700,- (umfatar undirvísing, skriftligt tilfar og kost).

Kvøldskeiðið 200,- kr.

Nærri fæst at vita hjá samskiparunum Elsa og Tummas í Garði tlf. 310150, 220797 og 224957.